## Nordisk Råds Natur- og Miljøpris 2000

Nordisk Råd uddeler i år for sjette gang Natur- og Miljøprisen. Prisen, der er på 350.000 DKK, gives til en privat eller offentlig virksomhed, gruppe eller person, som har udvist et særligt initiativ inden for natur- og miljøbeskyttelse.

**Temaet for 2000 er »Samarbejde med Nordens nærområder«**

*De nære områders miljøpolitik er også Nordens miljøpolitik – og omvendt. De nordiske lande og deres offensive miljøpolitik kan og bør derfor spille en rolle i miljøsamarbejdet med nærområderne. Prisen vil således i år blive tildelt en person eller organisation i Norden, som i særlig grad har bidraget til at udvikle samarbejdet på natur- og miljøområdet mellem Norden og Nordens nærområder, hvortil blandt andet regnes Arktis og alle lande, der omgiver Østersøen.*

Alle kan stille forslag til prismodtager. Forslaget skal motiveres og bestå af en beskrivelse af initiativet og oplysninger om, hvem som udfører eller har udført indsatsen. Initiativet må have faglig kvalitet og betydning for større kredse i et eller flere nordiske lande. Forslaget skal formuleres på maksimalt to A-4 ark.

Prismodtageren udpeges af en bedømmelseskomité, som består af repræsentanter for de 5 nordiske lande og de selvstyrende områder Færøerne, Grønland og Åland.

Forslaget, der skal skrives på et særligt skema, skal være sekretariatet i hænde **pr. post senest fredag den 26. maj.** Skemaet fås på Nordisk Råds hjemmeside www.norden.org eller ved henvendelse til sekreteriatet på adressen:

**Nordisk Råd**
**Den Danske Delegation**
Christiansborg, 1240 København K
Tlf. 33375958, fax 33375964

## Sandoyar sýslu javnaðarfelag

Lýsti ársaðalfundurin verður í Ungmannafelagshúsinum SAMLJÓÐ í Skopun

**mánakvøldið tann 3. apríl 2000 kl. 20.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Harumframt verður kaffiborð og burturluting. Við á fundinum vera umboð fyri tingbólkin hjá javnaðarflokkinum og formaður floksins.

**Nevndin**

Atlantic Airways

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Teknisku Deild hjá Atlantic Airways.

**Starvið:**
Arbeiðið fevnir um dagføring av ymiskum telduforritum, dagføring av hondbókum, skráseting av arbeiðstíð, samskifti úteftir, ymiskt skrivarakent arbeiði, umframt at gera ymiskt fyrifallandi arbeiði á deildini. Arbeiðsstaðið er á flogvøllinum.

**Umsøkjarin:**
Tann, ið settur verður, skal hava kunnleika at arbeiða við teldu, hava kunnleika í enskum máli, vera røkin og hava góð evni at samstarva.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum og prógvum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. apríl 2000 og skal sendast til:

**Atlantic Airways**
Tekniska Deild
(Skrivstovufólk)
Vága Floghavn
FO-380 Sørvágur

### Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Starvsløn til listafólk

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 100.000 játtaðar til starvsløn í 6 mánaðir. Starvslønin verður latin listafólki, sum virkar innan skaldskap, myndlist, leiklist, tónlist ella aðra list.

Nevnd, sett av landsstýrismanninum í mentamálum, ger tilmæli til landsstýrismannin um, hvør eigur at fáa starvslønina. Til tess at fáa starvsløn, má umsøkjarin kunna vísa til verk á høgum listaligum støði.

Umsøkjarar fáa oyðublað sendandi við at venda sær til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn
Telefon 355050 • Telefax 355055
e-postur: umms@umms.fo

Gjørt verður vart við, at oyðublaðið eisini er at finna á internetinum á www.umms.fo . Umsóknir verða at senda Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, og er umsóknarfreistin **mánadagin 3. apríl 2000**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið á telefon 355050.

## Aðalfundur

Boðað verður til aðalfund í Badmintonsambandi Føroya fríggjadagin 28. apríl 2000 kl. 18 í ÍSF-húsinum. Skrá sambært reglunum.

**Formaðurin**

## Skrivstovustarv

Føroya Shell søkir starvsfólk til bókhaldið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Ábyrgd av ognara-/skuldarabókhaldinum
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Kunna avloysa við EDV-skipanina
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Vit vænta at tú hevur:**
- Útbúgving og royndir innan skrivstovuyrkið
- Royndir innan ognarabókhald
- Hollan kunnleika til EDV og at tær dámar at samskifta við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- Møguleikar fyri útbúgving og persónligari menning
- Góða løn í samsvar við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 34 74 00 lokal 213.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum kann sendast til P/F Føroya Shell, Postbox 188, 110 Tórshavn og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. apríl 2000.

**Shell**

## Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum í

**Aling (2 t/v),**
**Samfelagsfrøði á C-stigi (3 t/v)**
**Smáverulívfrøði á B-stigi (4 t/v) og**
**Virkisbúskapi á B-stigi (6 t/v)**

at byrja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir samsvarandi tímalærarum á studentaskúla- og HF-skeiðunum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella á Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. apríl 2000.



**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo



Hagstova Føroya

## Heimasíðufyrisitari og NT-stuðul

**Starvsinnihaldið**
Starvið er fyri mesta partin at skipa fyri samskiftinum hjá Hagstovuni við umheimin um internetið og at vera NT-stuðul hjá hinum starvsfólkunum. Alt meira av teimum hagtølum og uppgerðum, sum vit á Hagstovuni framleiða, fara um internetið til brúkaran, og í tí sambandi hava vit brúk fyri einum fólki til at menna henda partin av upplýsingarvirkseminum.

Av tí at arbeiðið fyri stóran part annars fer fram í Oracle umhvørvi, er kunnleiki til Oracleskipanir og SQL forriting ein fyrimunur, tó ikki krav.

Hóast starvið í høvuðsheitum hevur við internetsambandið at gera, so kann roknast við at ein partur av arbeiðinum verður at luttaka í ymsum hagtalsuppgerðum.

**Persónurin og útbúgvingin**
Fólkið okkum tørvar skal hava hug til teldu-arbeiði sum heild, men haraftrat við evnunum at koma við hugskotum og at arbeiða sjálvstøðugt við heimasíðu og øðrum telduloysnum. Í hesum sambandi er eisini neyðugt at hava evnini at vera í tøttum samstarvi við aðrar telduumsitarar og fólkini, sum fáast við hagtalsuppgerðir.

Útbúgving innan teldufakið er ynskilig, men fólk sum hevur fingið sær førleikan á annan hátt ella hevur royndir úr øðrum starvi er eisini vælkomið at søkja starvið.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10.apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Hermann Oskarsson, stjóra, á telefon 352028 ella í telduposti hermann@hagstova.fo.

## Leiðari søkist

Vit sóknast eftir leiðara til handlarnar.

| | |
|---|---|
| **Myllan** | **Amboð & Búnýti** |
| v/J. H. Joensen | v/J. H. Joensen |
| 370 Miðvágur | 370 Miðvágur |
| Tlf. 332851 | Tlf. 333555 |

Hagstova Føroya

## Fulltrúi til hagtalsuppgerðir

**Starvsinnihaldið**
Í høvuðsheitum er uppgávan at arbeiða við vinnuligum og øðrum búskaparligum hagtølum, sum liggja til grund undir ymsum uppgerðum.

Eitt nú til uppgerð av tjóðarroknskapi gera vit sonevndar deildarroknskapir fyri allar privatar vinnur, kommunurnar sum heild, landskassan og donsku statspartarnar í Føroyum. Starvið verður serliga at vera við í arbeiðinum við hesum deildarroknskapum, men kann samskiftans umfata aðrar hagtalsuppgerðir í sambandi við búskapin annars.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í roknskaparviðurskifti og skili fyri samfelagsbúskapi, sum dugir at arbeiða við mest vanligu telduforritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Tað er ein fyrimunur at kenna eitt sindur til forriting í SQL ella øðrum forritingarmáli, men ikki eitt krav kortini.

Hóast tað krevst at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.merc. ella bachelor útbúgving í búskaparligum/fíggjarligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15.apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Hermann Oskarsson, stjóra, á telefon 352028 ella í telduposti hermann@hagstova.fo.

## Søkt verður

eftir einum royndum kranførara til RUSTON 61 (wiremaskinu) at byrja beinanvegin.

Lønt verður eftir sáttmálanum + møguligt bonus kemur uppá tal.

**Højgaard & Schultz**

Tlf. 216442 Mads Hansen (Basa)

### Fiskimálastýrið
### Sjóvinnufyrisitingin

## Sjóvinnubrøv

**Sjóvinnufyrisitingin boðar frá, at tey sjóvinnubrøv, sum geva rættindi sum dekksella maskinyvirmaður á handilsskipum í altjóða sigling, skulu í seinasta lagi 1. februar 2002 vera skift út til tey sokallaðu STCW-95 sjóvinnubrøvini.**

Skipað verður soleiðis fyri, at:
- sjóvinnubrøv, sum eru útgivin í 1995 ella áður, skulu skiftast út innan 1. apríl 2001
- sjóvinnubrøv, sum eru útgivin í tíðarskeiðinum 1996 til og við juni 1999, skulu skiftast út í tíðarskeiðinum 1. apríl 2001 til 31.januar 2002.

Treytirnar fyri at fáa tey nýggju sjóvinnubrøvini eru:

**Navigatørar:**
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- galdandi sjónar- og hoyrnarroynd
- 2 stk. passmyndir
- siglingarbók ella aðra váttan um siglingartíð
- prógv fyri lokna útbúgving á sjómansskúla
- GMDSS, GOC ella ROC-prógv
- navigatørar, ið hava staðið skipara- ella stýrimansprógv áðrenn 1991, skulu harafturat hava lokið skeið í vandamiklum farmi
- ARPA-simulatorskeið

**Maskinmeistarar:**
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- passmynd
- siglingarbók ella aðra váttan um siglingartíð
- prógv fyri lokna útbúgving á maskinmeistaraskúla

Teir navigatørar, sum ikki hava staðið radarsimulatorskeið ARPA, fáa árit um, at sjóvinnubrævið ikki gevur rættindi umborð á skipum, sum hava hesa útgerð.

Viðkomandi má persónliga møta upp eftir nýggja sjóvinnubrævinum fyri samstundis at undirskriva hetta.
Fyri at lætta um umsitingarliga verður mælt til, at avrit av neyðugum skjølum saman við passmynd verða innsend frammanundan.
Bústaðurin skal upplýsast.
Frumrit av hesum skjølum skulu framvísast áðrenn vinnubrævið verður handað.

Víst verður annars til kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk.

Tórshavn tann 30. mars 2000

**Sjóvinnufyrisitingin**
Yviri við Strond 19
100 Tórshavn

Fartelefonir
www.tt.fo
Staravegur 5 - Postsmoga 1144 - FO-110 Tórshavn - Tlf.: 317620 - Fax: 317699